## Stylecoaching á Damucruise

Sum ein partur av skránni fyri »Festligt damucruise« 28. mai – 1. juni, fara Annika Johansen og Una Jacobsen at siga luttakandi damunum eitt sindur um stíl. Annika og Una hava báðar tikið útbúgving sum Style Coach hjá Tini Owild, kendur danskur stylistur, sum í 2008 vitjaði á Lívsstílsstevnuni. Fyrilesturin er ein partur av fjølbroyttu, spennandi skránni fyri »Festligt damucruise«.



*Modelmynd*

## Útbyggja Prentmiðstøðina

Einasta rotatiónsprentsmiðjan í landinum, Prentmiðstøðin, verður í hesum døgum útbygd. Prentmiðstøðin hevur millum annað til uppgávu at prenta Sosialin, og útbyggingarnar merkja, at síðutal okkara verður nakað skert, tað sum eftir er av hesum mánaðinum. Og hetta hevur eisini við sær, at vit ikki hava vanliga vikuskiftisinnlegg okkara við í blaðnum í dag. Seinast í hesum mánaðinum verða útbyggingarnar væntandi lidnar, og tá hevur Prentmiðstøðin øktar møguleikar fyri litsíðum, soleiðis at hon er enn betur før fyri at veita ynsktu tænastuna til bæði tíðinda- og lýsingarbløð.

# Finna sparingar á eldraøkinum

**Nú tað sær út til, at fíggjarlógin skal strammast eitt sindur, greiðir Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, frá, at útreiðslurnar til almannaøki vaksa ov skjótt, og tí skal kannast, um tað ber til at gera sparingar har**




*Tað kundi meira enn so hent seg, at hallið á fíggjarlógini verður størri, enn tað varð lagt upp til*

FÍGGJARLÓG
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár og í fyrradagin hava fundir verið í Vágunum, har fíggjarliga støðan í landinum varð viðgjørd. Eftir hesar fundir greiðir Jóannes Eidesgaard frá, at tað verður neyðugt at stramma fíggjarlógina við eini 100 milliónum krónum, so hallið ikki verður størri enn tær 500 milliónirnar, ið lagt er upp til.

- Vit síggja at útreiðslurnar til ymisk øki á almannaøkinum vaksa nógv skjótari enn allir hinir postarnir, so vit fara at hyggja uppá, hvat vit kunnu gera har, sigur fíggjarmálaráðharrin, sum vísir á, at tað millum annað eru útreiðslurnar til eldraøki, ið vaksa óvanliga skjótt.

### Tungt at skerja

Tað er ikki langt síðan, at nógv vóru frammi og úttalaðu seg um, hvussu nógv eldraøkið er afturútsiglt, og Jóannes Eidesgaard, dugir væl at síggja, at tað er verður trupult at gera skerjingar.

- Tað fer heilt víst at vera torført, men vit fara inn politiskt at kanna, hvat kann gerast, sigur fíggjarmálaráðharrin, sum harmast, at vit eru komin so stutt við at tryggja okkara egna aldurdóm.

### Størri hall enn væntað

Jóannes Eidesgaard greiðir somuleiðis frá, at hallið á fíggjarlógini verður eitt sindur størri, enn tað mann roknaði við, tí brúkið er minkað í stórum og færri pengar fara at koma inn í partafelagsskatti og kapitalvinningsskatti.

- Hetta er framvegis bara ein fyribilsmeting, so tað ber ikki ordiliga til at siga nakað við vissu, men sum tað sær út, verður hallið einar 100 milliónir krónur størri enn væntað, um vit ikki megna at gera nakrar skerjingar, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann leggur afturat, at hann vónar, at fólk fara at fáa størri mót at nýta pening í komandi tíðum, so kapitalflutningurin í landinum aftur nærkast einum vanligum støði. Umframt, at hann staðfestir, at eitt hall á 500 milliónir er nakað, mann kann liva við í eitt ár, men ikki í fleiri fylgjandi ár.

# Ov lítið fyri pengarnar



*- Tað verður ikki bara eldraøkinum, vit fara at hyggja at rationaliseringum, tað verður yvir alt almannaøki, sigur Rósa Samuelsen*

**Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, vísir á, at tað verður í øllum kassum á almannaøkinum, at mann fer at hyggja eftir, hvørjar rationaliseringar kunnu gerast.**
**– Tað er ongin, sum sigur, at pengarnir verða gagnnýttir á bestan hátt, sigur landsstýriskvinnan**

FÍGGJARLÓG
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eftir fundirnar í Vágunum seinastu dagarnar, hevur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri víst á, at útreiðslurnar á almannaøkinum vaksa óvanliga skjótt, og mann tí fer at kanna, um nakrar rationaliseringar kunnu verða gjørdar har, fyri at halda halli á fíggjarlógini á ætlaða støðinum. Sum dømi hevur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri nevnt eldraøkið, sum eitt stað, har ávísar rationaliseringar kunnu gerast, og at ein politisk ætlan er í gongd við hesum.

So er spurningurin, hvørjar rationaliseringar kunnu gerast.

- Tað er enn ilt at siga, hvat fer at henda, og tað er ikki nakað, eg fari at úttala meg um, sigur Rósa Samuelsen, sum staðfestir, at tað ikki bara er eldraøkið, ið verður eftirhugt.

- Tað verða allir kassar í almannamálaráðnum, og tá arbeiðið er liðugt er ætlanin, at brúkarin skal hava eina betri tænastu enn í dag.

### Færri pengar

Tá minni peningur er til eitt øki, so plagar hetta at merkja, at tænastan lækkar, men tað roknar Rósa Samuelsen ikki við fer at henda.

- Tað er ongin, sum sigur, at pengarnir verða gagnnýttir á bestan hátt, sigur landsstýriskvinnan í almannamálum. Hon leggur afturat, at hon ikki vil koma konkret inná, hvørjar ætlanir eru, men at ætlanir eru í gongd, ið skulu leggjast fyri ting.

Ætlanin er, at nakrar av hesum rationaliseringum skulu gerast í ár, meðan nakrar skulu setast í verk í næsta ár.